# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Kann tað unga, irakska demokratiið basa sínum fíggindum, fær tað stóra ávirkan á Miðeystur*

*(George W. Bush)*

# Madeleine fekk ov nógvar sovitablettir

**Franska blaðið France Soir hevur frá keldum fingið at vita, at Madeleine McCann doyði eftir at hava fingið ov nógvar sovitablettir**

Í vikuni kom fram, at portugisiska løgreglan hevði funnið kropsvætu í viðførisrúminum á einum bili, sum Gerry og Kate McCann høvdu leigað í Portugal, og at DNA-royndir høvdu víst, at kropsvætan stavaði frá Madeleine.

Nú sigur franska blaðið France Soir seg hava fingið at vita frá sínunm keldum, at DNA-royndirnar vístu, at Madeleine McCann var doyvd, tá hon doyði. Blaðmaðurin Guilhem Battut skrivar, at eftir DNA-royndunum at døma hevði gentan fingið okkurt doyvandi evni og helst sovitablettir og so stórum nøgdum, at tað var nóg mikið til at taka lívið av henni. Sambært franska blaðmanninum er tað doyvandi evnið umrøtt í frágreiðingini, sum ákæruvaldið í Portugal hevur fingið.

Bretskir kriminalteknikarar ivast kortini í innihaldinum í fronsku greinini. Teir siga við Daily Mail, at úrslitið av DNA-royndunum var ikki so týðiligt, at tað ber til at siga við vissu, at Madeleine hevði fingið nakran heilivág.

Guilhem Battut er ein virdur blaðmaður í Fraklandi, og hann er millum annað kendur frá tí, sum hann skrivaði um tilburðin, tá Diana prinsessa doyði í París fyri tíggju árum síðani.



*Sambært France Soir fekk Madeleine McCann ov nógvar sovitablettir*

# Vit bjargaðu Reagan

**Í 1984 forðaðu kubansku myndugleikarnir einari ætlan at myrða táverandi amerikanska forsetan, Ronald Reagan**

Í einari drúgvari grein í floksblaðnum Gramma greiðir kubanski forsetin, Fidel Castro, frá, at í 1984 fekk kubanska sendinevndin á ST-høvuðsborgini í New York frænir av, at ein høgravendur bólkur í USA ætlaði at beina fyri Ronald Reagan, forseta. Málið hevði skund, tí teir høgravendu ætlaðu at skjóta forsetan, tá hann skuldi á ein veljarafund í statinum North Carolina nakrar dagar seinni.

- Vit gjørdu av at siga amerikonsku myndugleikunum frá. Tað eydnaðist okkum at fáa at vita, hvørjir menninir aftan fyri drápsætlanina vóru, hvar teir skuldu hittast í sambandi við morðið, og hvussu teir ætlaðu at myrða Reagan. Allar upplýsingarnar góvu við amerikanarunum, greiðir Castro frá.

Í greinini verður sagt, at nakrar dagar seinni tók FBI fleiri fólk í North Carolina, og Ronald Reagan slapp við lívinum. Castro sigur, at ein av teimum kubansku diplomatunum á ST-høvuðsborgini fekk eina heilsan at bera kubansku stjórnini við tøkk fyri upplýsingarnar, sum avdúkaðu drápsætlanina.



*Ronald Reagan avmyndaður í 1985 saman við nøkrum av sínum næstu medarbeiðarum*

## STUTT SAGT

### Subkov kanska valevni

Viktor Subkov, sum tekur við sum russiskur forsætisráðharri, nú Mikhail Fradkov hevur biðið um at sleppa frá, fer kanska at stilla upp á russiska forsetavalinum, sum verður í mars næsta ár. Við tíðindastovuna Interfax sigur Subkov, at hepnast tíðin sum forsætisráðharri væl, er tað ikki óhugsandi, at hann fer at dyrgja eftir embætinum sum russiskur forseti. Russar vita yvirhøvur lítið um Viktor Subkov, tí hann er rættiliga ókendur sum politikari, og tað kom eisini óvart á mong, at hann bleiv tilnevndur forsætisráðharri. Fleiri halda tó, at hann er settur á næstovastu rók, sum hann ætlandi skal taka við eftir Vladimir Putin, forseta næsta ár.

### Vandi fyri kríggi

Grannalondini Etiopia og Eritrea eru aftur vorðin ósamd um markið millum londini, og eygleiðarar stúra fyri, at ósemjan fer at gera enda á friðinum, sum fekst í lag fyri sjey árum síðani. ST hevur friðarvarðveitandi hermenn í økinum, men partarnir eru vorðnir alt meiri ágangandi í seinastuni, og umstøðurnar hjá ST-hermonnunum eru versnaðar nógv. Fleiri smærri samanbrestir hava verið millum etiopsikar og eritreiskar hermenn, men ST-hermenninir hava megnað at forða veruligum bardøgum, skrivar Reuters.

### Strikaði skuld

Tað var helst eitt slag av kurteisi, tá danska stjórnin gjørdi av at strika gamla skuld hjá Brasil, nú brasilski forsetin, Lula da Silva, var í Keypmannahavn og vitjaði. Í veruleikanum var talan heldur ikki um vanliga skuld, men um 10 mió. krónur, sum Brasil skuldi rinda danska ríkiskassanum, tá Danmark misti rættin at krevja toll frá skipum, sum fóru ígjøgnum Oyrasund. Brasil rindaði ongantíð gjaldið, og nú fekk Lula so at vita, at gjaldið er strikað.